Thomas Arabo um Finnboga:

# Ein ótrúligur maður

**– Hann var ein ótrúligur maður. Altíð við uppá at útvikla nakað og finna uppá nakað nýtt. Treiskur og málrættaður. Og dugdi ótrúliga væl at arbeiða. Hetta er ein stórur missur fyri Føroyar sigur fyrrverandi samgongufelagi og persónligur vinmaðurin hjá Finnboga Ísakson, Thomas Arabo**

FINNBOGI FARIN

*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Teir hava havt so nógv saman í politikki og arbeiði til fram fyri Føroyum, hóast teir vóðru í hvør sínum flokki. Men frá fyrsta degi, at Thomas hitti Finnbogi, dróg saman millum teir og Thomas Arabo minnist aftur politikaran og vinin Finnbogi við nógvum góðum orðum.

- Fyrstu ferð eg kom at kenna Finnboga var sum skrivari í samferðslunevndini í 1973. Tá var Finnbogi har sum umboð fyri Tjóðveldisflokkin. Eg minnist so ótrúliga væl, tá hann fór út av einum fundi og Sofus Sivertsen hann, hvat hann nú fór at gera. Og so letur í honum: - Eg fari nú at gera eitt tíðindablað. Og so flentu allir, tí blaðútgáva í Føroyum gav jú ongar pengar. Men Finnbogi tók øll á bóli. Hann tók eitt megnartak og fekk eitt superblað, sum hevur verið fyrimynd fyri nógv bløð aftaná, ikki minst Sosialin.

Thomas helt sambandið við Finnboga øll komandi árini. Tá landsstýrisskifti var í 74 møtti hann Finnboga á Gjaldstovuni og segði seg hava hoyrt, at hann skuldi í landsstýrið. Hann játtaði, at hann fór í Tinganes at vera samferðslumálaráðharri. - Og tá komu vit at arbeiða ótrúliga væl saman. Tá var Tummas samferðslustjóri.

Finnbogi kastaði síðani Tíðindablaðið frá sær og tók við teimum nýggju avbjóðingunum, sum tá vóru. Hansara bragd longu í 74 var, at tað var fyrstu ferð, at eitt samgonguskjal varð skrivað og kunngjørt í Føroyum. Tað var hann, sum vildi hava tað. Hann fekk so eisini ein annan sterkan mann í landsstýrið. Tað var Atli Dam. Finnbogi vildi hava allar avtalur niðurskrivaðar, so hann fekk tað ígjøgnum hann vildi hava. Hann var sera málrættaður.

Thomas og Finnbogi vórðu menninir aftanfyri Smyril. – Ta søguna kenna tey flestu, hvussu hann var við til at fáa uttanlandssiglingina upp at standa. Síðani fór hann í gongd við postverkið. Hann trýstið tað ígjøgnum og fekk tað yvirtikið í sínum skeiði í Tinganesi.

Eftir valið í 78 segði hann við meg, at hann fór ikki aftur í Tinganes. Eg gjørdist rættiliga ovfarin av tí, tí eg helt tað gekk so væl. Men hann hevði sína grund. Hann helt ikki, at tað vóru pengar til at gera nakað nýtt í næsta skeiði, og tí sá hann ikki stórvegis avbjóðingar har. Hann fór tá úr Tinganesi, sum var hansara egna val. So hoyrdu vit ikki so nógv til hann tey komandi árini. Hann varð valdur aftur í 78 og 80 og fer so at arbeiða í sjónvarpinum. Og gjørdi hann seg galdandi og kann



*Finnbogi Ísakson endaði politiska skeið sítt sum løgtingsformaður 1998–2002*

sigast, at hann er ein av høvuðskonstruktørunum aftan fyri flaggskipið í sjónvarpinum, Dagur og Vika.

Í 84 stillar hann ikki upp, men í tíðarskeiðinum 84 til 88 stillar hann einsamallur tjóðveldismaður upp til fólkatingið. Og tað er ein klassikari at síggja, tá hann og Atli Dam standa og dystast í Norðurlandahúsinum, báðir í ljósum klædningi. Tað eru søguligar myndir. Hann kom so ikki inn á fólkating men stillar aftur upp til løgtingið í 88, hesaferð í Havnini. Og eksperimenterandi sum hann altíð var fór hann í holt við sambandsflokkin. Hann fekk roynt hesa konstellatiónina millum tjóðveldisflokkin og sambandsflokkin, sum var nakað heilt serligt. Men tað gekk so ikki, tí tað helst - sum hann segði mær herfyri - bleiv saboterað av Paula Ellefsen vonginum. So rýmdi hann úr tí landsstýrinum.

Hann verður valdur aftur í 90 og verður í andstøðu til 93, tá fólkaflokkurin fór úr Tinganesi. Tá blivu hann, Marita Petersen, Asbjørn Joensen og eg sjálvur samdum, at tað var skeivt at tveita landið út í nývál, tá alt hekk í leysari luft. So møtti Finnbogi upp í Tinganesi og vit gjørdu eina samgongu. Eg minnist, at Finnbogi einsamallur skrivaði samgonguskjalið ta náttina, og tað tók honum minni enn ein tíma. Marita og Finnbogi koyrdu sera væl saman. Tann samgongan helt til okkara góði vinur Asbjørn Joensen doyði. Tá skiltust okkara vegir sum so politiskt. Men vit hava altíð hildið samband við hvør annan.

Thomas vitjaði Finnboga fleiri ferðir, nú hann gjørdist sjúkur, tí sonn vinarbond vórðu teirra millum. Og nú hann er farin hevur Thomas hetta skoðsmálið um Finnboga Ísakson: – Hann var ein ótrúligur maður. Altíð við til at útvikla nakað og finna uppá nakað nýtt. Treiskur og málrættaður. Og dugdi ótrúliga væl at arbeiða. Hetta er ein stórur missur fyri Føroyar. Eg eri so forharmaður, at hann skuldi fara nú og so ungur sigur Thomas Arabo, sum heldur tað vera stórt spell, at Finnbogi ikki slapp at skriva alt tað, sum hann hevði upplivað, hoyrt og sæð. Tað hevði verið ein dýrgripur fyri okkum øll slapp Finnbogi at skriva, umseta og arbeiða við øllum tí hann longu var í gongd við og hevði í hyggju.

Jóannes Eidesgaard, løgmaður:

# Finnbogi tordi at taka avgerðir

**– Finnbogi hevði orðið í sínari makt og dugdi væl at føra fram síni sjónarmið. Hann var lágmæltur, men tá ið hann tosaði, so lurtaðu fólk, sigur løgmaður um Finnboga Ísaksson**

FINNBOGI FARIN

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

– Eg kendi Finnboga væl frá tí politiska umhvørvinum. Vit sótu í løgtinginum saman, og eg fekk eisini høvi at sita í landsstýrinum saman við honum. Finnbogi var ein sera gløggur politikari, og eitt aktuelt dømi um hansara avrik er Smyril. Hann var fyri 30 árum síðani við til at skapa tað stóra frambrot at fáa Smyril til landið, sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður.

– Tað, sum eyðmerkti Finnboga sum politikara, var, at hann var so ógvuliga greiður við sínum sjónarmiðum. Hann var sakligur og hevði eisini evnini at viðgera uppskot frá politiskum mótstøðumonnum. Hann tók tað til sín, sum aðrir komu við.

– Finnbogi var eitt oratoriskt begávilsi. Hann hevði orðið í sínari makt og dugdi væl at føra fram síni sjónarmið. Hann var lágmæltur, men tá ið hann tosaði, so lurtaðu fólk. Hann hevði eisini ein góðan penn, og tað vísa hansara bókligu avrik.

### Framúr eygleiðari

Løgmaður heldur eisini nógv av avrikunum hjá Finnboga Ísaksson sum viðmerkjari.

– Seinnu árini hevur Finnbogi verið eina framúr góður eygleiðari og viðmerkjari, og hann hevur givið kjakinum nógv. Hann hevur dugað at lyft seg upp frá og sæð tingini yvirornað, og vit koma at sakna hann sum viðmerkjara.

– Finnbogi hevði drivi at taka avgerðir og gjøgnumføra tær. Til dømis framdi hann sum løgtingsformaður ein reform í tinginum, og hóast øll ikki vóru so fegin um hetta, so tordi hann taka avgerðir og standa fast.



*Finnbogi Ísakson hevur orðið í síni makt, sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður*

– Finnbogi var eisini ein trúgvur vinmaður hjá mær, hann var lættur í lyndi, og tað lá honum altíð frammarlaga at hava okkurt skemtiligt at siga, sigur Jóannes Eidesgaard.

Høgni Hoydal:

## – Finnbogi var sera gløggur politikari

**– Finnbogi Ísakson er ein tann gløggasti og best analyserandi politikarin, sum føroyingar hava átt, og hann hevði stóra virðing tvørtur um floksmørk, sigur Høgni Hoydal, formaður í Tjóðveldisflokkinum**

FINNBOGI FARIN

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Formaðurin í Tjóðveldisflokkinum heldur, at Finnbogi Ísakson var ein burturúr gløggur politikari, og at Finnbogi hevði stóra virðing í politiska umhvørvinum.

– Alt ov tíðliga hava vit mist ein stóran politikara, stóran menta- og fjølmiðlamann, sum hevur lagt so ótrúliga nógv eftir seg í nútímans samfelagnum, sigur Høgni Hoydal.

– Tjóðveldisflokkurin og loysingarrørslan hava mist ein av sínum mest markantu og dugnaligu politikarum. Finnbogi Ísaksson er ein tann gløggasti og best analyserandi politikarin, sum føroyingar hava átt, og hann hevði stóra virðing tvørtur um floksmørk.

– Men Ása hevur mist mannin og lívsfelagan, og synirnir hava mist pápan, og okkara tankar og samkensla leitar fyrst og fremst til teirra. Vit vildu unt Ásu, synunum og familjuni, at tey kundu havt notið góð ár, nú Finnbogi valdi at fara av politiska pallinum á lutfalsliga ungum aldri, men soleiðis skuldi ikki verða.

– Vit minnast Finnboga í takksemi og við virðing, sigur Høgni Hoydal.

**Meira á síðu 12**